# Fíggjarmálaráðið

## Ummælisskriv

Talgildi samleikin er ein av høvuðstættunum í Talgildu Føroyar verkætlanini, hvørs endamál er at geva føroyingum ein léttari gerandisdag, at gera vælferðarsamfelagið betri og at styrkja kappingarførið hjá vinnu og landi.

Talgildi samleikin er ein KT-loysn til elektroniska eyðmerking av persónum og elektroniska undirskrift, ið kann nýtast á talgildum tænastum, so sum á borgaraportalum og talgildum sjálvavgreiðslum, bæði hjá almennum stovnum og privatum virkjum.

Menningin av Talgilda samleikanum er komin langt áleiðis, og gongur sum ætlað fáa allir føroyingur og allar føroyskar fyritøkur fáa sín egna talgildan samleika í fyrru helvt av komandi ári. Nýggi talgildi samleikin fer m.a. at gera  tað skjótari og einfaldari hjá borgarum at avgreiða síni viðurskifti talgilt.

Í dag er neyðugt at halda skil á einari langari røð av loyniorðum og tí noyðast borgarar at geva somu upplýsingar til fleiri ymiskar almennar myndugleikar. Við talgilda samleikanum fær hvør einstakur borgari eitt talgilt log-in, ið kann nýtast til allar skipanir. Umframt at gera tað skjótari og einfaldari fyri einstaka borgaran at halda skil á og avgreiða egin viðurskifti, fer hetta eisini at merkja, at upplýsingarnar verða rættari og tryggari.

Lógaruppskotið skipar karmarnar um Talgilda samleikan.

Ummælissvar kunnu latast Fíggjarmálaráðnum á fmr@fmr.fo

Ummælisfreistin er 31.10.2018.